VEÐRIÐ

Petur Skeel Jacobsen greiðir frá um veðrið



Veðrið í morgin:
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av útsynningi og samdrigið og mjørki í støðum. Hitin millum 10 og 13 stig.



Veðrið leygardagin:
Fyrrapartin andøvsgul upp í ein strúk av suðri og regn, seinnapartin minni vindur av vestri og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 11 og 14 stig.



Veðrið sunnudagin:
Gul til stívt andøvsgul av útsynningi og yvirhøvur turrt og sólglottar, men um kvøldið veksur hann vindin upp í hvassan vind og regn. Hitin millum 10 og 13 stig.

Veðrið mánadagin og týsdagin:
Strúkur í vindi ella hvassur vindur av útsynningi og ælingur, men onkur sólglotti. Hitin millum 8 og 12 stig.

Ítróttasambond vitjaðu Klaksvík

Umboð fyri norðurlendsku ítróttarsambondini vóru um vikuskiftið á vitjan, her tey eitt nú fingu frágreiðing um býin, mentanina og sjálvsagt serliga ítróttin og tær umstøður hann hevur í Klaksvík.

SAMSTARV

35 umboð fyri øll norðurlendsku ítróttarsambondini hava verið á árligum fundi í Føroyum, har Starvsnevndin hjá ÍSF stóð fyri og samskipaði fundirnar og vitjanina annars. Hesir fundirnir eru í øllum norðurlondunum uppá skift – hesaferð í Føroyum.

Í ferðalagnum vóru allir "topparnir" í norðurlendskum ítróttarligum høpi. Teir koma víða um og hava sera gott innlit í, hvussu ítróttur verður skipaður, og hvørji kor hann hevur at kalla í øllum Europa.

Hesa ferð snúði fundurin seg serliga um trý evni: ES, ítrótt og fólkaheilsu og fíggjarkreppuna, men kunnað varð eisini um fyrireikingarnar til Olympisku ráðstevnuna í Keypmannahavn í oktober og fyrireikingarnar hjá Norðurlondunum til vetrar OL í Vancouver næsta ár.

Høvið var eisini at hyggja seg um. Fríggjakvøldið varð Løgmaður vertur í Tinganesi, og leygardagin gekk leiðin til Klaksvíkar.

Tey sóu stadionøkið, vóru í Badmintonhøllini og Svimjihøllini, vóru Úti í Grøv, Christianskirkjuni, Dávavirkinum og fingu eina frágreiðing um býin annars eftir ferðini og í býráðshøllini frá Dáva Winther, mentanardeildarleiðara.

Varaborgarstjórin, Jógvan Skorheim, var vertur við einum døgurða og greiddi eisini frá arbeiðnum hjá politisku skipanini innan mentanar- og ítróttarøkið.

Varaforsetin í norska ítróttarsambandinum, Odd Roar Thorsen takkaði, eins og hini, fyri áhugaverda ferð í Klaksvík, men legði afturat, at tað eru ikki nógvir býir í Noregi við 5.000 íbúgvum, sum hava so góðar ítróttarligar karmar sum Klaksvík.

Ferðalagið var eisini hugtikið av heilsufaldaranum hjá Klaksvíkar býráð, og fleiri teirra vildu hava eitt eintak, hóast hann var á føroyskum, sum eina góða fyrimynd um, hvussu øll rørslutilboð kunnu vera skipað og bjóðað í einum sera kveikjandi og áhugavavedum faldara, sum tey hildu heilsufaldaran hjá Klaksvík vera.

Jú, Klaksvík kann av sonnum kalla seg ein heilsu- og ítróttarbý við teimum góðu kørmum, sum her eru, saman við teimum mongu feløgunum, sum ganga undan, hildu norðurlendsku gestirnir fyri.

Ferðin í Klaksvík endaði við, at gestirnir sluppu upp á gólv í Skálanum saman við umboðum fyri Klaksvíkar Dansifelag. Hetta setti eitt virðiligt punktum fyri eina

Hitalagið kring knøttin

Illulisat	2
Nuuk	--
Qaqortoq	--
Ammassalik	--
Saint John's	--
Halifax	--
Reykjavík	12
Seyðisfjørður	14
Tórshavn	12
Lerwick	12
Aberdeen	13
London	16
Tromsø	--
Bergen	15
Oslo	--
Stokkhólm	14
Keypmannah.	15
Helsinki	15
Moskva	20
Berlin	14
Warzawa	18
Kiev	22
Bukarest	25
Paris	17
Madrid	25
Róm	24
Malorca	27
Athen	26
Malta	23
Tunis	24
Beijing	26
New Dehli	31
Bangkok	33
Jakarta	34
Sydney	17
New York	25
Miami	30
Los Angeles	20
Meksikobýur	--
Panama	29
La Paz	17
Rio de Janeiro	--
Buenos Aires	19

LUFTTRÝSTIÐ

Síðstu nátt:



Komandi nátt:



Síðstu nát:
Eitt lágtrýst, 984 hPa. eystan fyri Hvarvið fer í landnyrðing og kuldabrúgvin sunnan fyri ísland kemur hendavegin.

Komandi nátt:
Lágtrýstið vestan fyri Írland fer spakuliga í landnyrðing og hitabrúgvin til Føroyar fer vestureftir.

HITALAGIÐ



Hitalagið mált frá 13/09 kl. 06⁰⁰ – 14/09 06⁰⁰. Hitin í gjár: 10,9°
Minsti hiti máldur í september: -0,5° -
Mesti hiti máldur í september: 19,5°

AVFALLIÐ



Avfallið: 0,0 mm – mált frá 13/09 kl. 06⁰⁰ – 14/09 06⁰⁰.
Avfallið higartil í september: 43 mm

javni
– Virkin og virðismikil
www.javni.fo

VESTFALLSKYRRINDI

12. september Seinna kvarter
16. september Mánin næstur jørðini
18. september Tendring

Kelda: Almanakkin 2008

Dagur	Suðuroyar-/Vágafirði fp.	Suðuroyar-/Vágafirði sp.	Skúvoyar-/Skopunarfirði fp.	Skúvoyar-/Skopunarfirði sp.	Hestfirði/Sundalagnum fp.	Hestfirði/Sundalagnum sp.	Vestmannasundi fp.	Vestmannasundi sp.	Mykinesfirði fp.	Mykinesfirði sp.	Nólsoyarfirði fp.	Nólsoyarfirði sp.	2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp.	2 fj. í LS úr Mjóvanesi sp.	Leirvíksfirði/Haraldssundi fp.	Leirvíksfirði/Haraldssundi sp.	Kalsoyar-/Svínoyarfirði fp.	Kalsoyar-/Svínoyarfirði sp.	Hvannasundi fp.	Hvannasundi sp.	Fugloyarfirði fp.	Fugloyarfirði sp.
17. sept	05:53	18:18	04:53	17:18	05:08	17:33	07:53	20:18	08:53	21:18	04:08	16:33	03:08	15:33	06:08	18:33	07:08	19:33	05:38	18:03	06:53	19:18
18. sept	06:41	19:05	05:41	18:05	05:56	18:20	08:41	21:05	09:41	22:05	04:56	17:20	03:56	16:20	06:56	19:20	07:56	20:20	06:26	18:50	07:41	20:05
19. sept	07:28	19:52	06:28	18:52	06:43	19:07	09:28	21:52	10:28	22:52	05:43	18:07	04:43	17:07	07:43	20:07	08:43	21:07	07:13	19:37	08:28	20:52
20. sept	08:16	20:40	07:16	19:40	07:31	19:55	10:16	22:40	11:16	23:40	06:31	18:55	05:31	17:55	08:31	20:55	09:31	21:55	08:01	20:25	09:16	21:40
21. sept	09:04	21:28	08:04	20:28	08:19	20:43	11:04	23:28	-	12:04	07:19	19:43	06:19	18:43	09:19	21:43	10:19	22:43	08:49	21:13	10:04	22:28